## DAGSINS MEINING

# Ríkisfundur

Ì vikuni verður ríkisfundur í Grønlandi. Ein ríkisfundur er ein fundur, har forsætisráðharri, grønlendski landsstýrisformaðurin og løgmaður hittast á máli. Ríkisfundurin er eitt rættiliga nýtt og eitt heilt óformligt fyribrigdi, ið ikki er fyrisett í nakrari lóg. Endamálið við fundinum er, at partarnir skulu kunna hvønnannan um týðandi mál av felags áhuga, skifta orð um stórar politiskar spurningar av týdningi fyri ríkisfelagsskapin og annars hittast undir óforpliktandi umstøðum.

Tað má ásannast, at ríkisfundurin er eitt eitt sindur løgið fyribrigdi. Hetta, at toppleiðarar hittast uttan formligar karmar og uttan, at nøkur niðurstøða ella felags fráboðan verður send út eftir fundin, kann vera gagnligt. Tað kann sjálvsagt vera gagnligt, at ovastu politisku leiðararnir í ríkinum fáa høvi at skifta orð og hittast uttan at vera órógvaðir av pressu og trongum formligum og løgfrøðiligum rammum. Tað kann ivaleyst eitthvørt gott koma burturúr slíkum fundi, serstakliga har talan er um eym mál ella um mál, har misskiljingar hava gjørt seg galdandi.

Hinvegin skerst ikki burt, at slíkir toppfundir, hildnir undir hesum nevndu fortreytum, eisini eru eitt sindur ivasamir sæð frá einum demokratiskum sjónarmiði. Er tað í tráð við góðan fyrisitingarsið at halda toppfundir av hesum slagi? Er hetta í tráð við alment galdandi demokratiskar og parlamentariskar spælireglur? Er tíðin ikki farin frá hesum formi. Áttu vit ikki heldur at gjørt ríksifundirnar til ein formligan og týðandi part av politisku skipanunum í teimum trimum londunum?

Tá alt hetta er sagt, skal samstundis verða gjørt vart við, at stór og týdningarmikil mál ivaleyst verða viðgjørd á ríkisfundinum í Grønlandi. Vit kunnu nevna spurningin um avleiðingarnar av ES grundlógini, trygdarspurningar, sjálvstýrismál og mangt annað. Tað verður tí sjálvsagt áhugavert at frætta, hvat, ið kemur burturúr ríkisfundinum, tá ið avtornar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hevur Jenis tikið við luti Várharra?

**Ívar Iversen**



…Og Guð sá, at alt var gott… Jenis av Rana tykist ikki vera samdur við hann – Alfaðirin. Sum eitt óløgi leggur hann eftir løgmanni, tí hann hevur dittað sær at tala – ella umrøtt – søk teirra í minniluta. Hesin nýggi »hertogi av Alba«, ið var ein sterkur stuðul hjá sponsku inkvisitiónini, ið herjaði eirindaleyst millum »trúgvandi og vantrúgvandi« serliga í Niðurlondum um fyri sløkum 500 árum síðan, hevur við løgnu útsøgn síni vanvirt tey, ið eru ikki – eftir hansara (Jenisar) meting – Guðs rættu skapningar.

Tað kendist sum ein ófrættakendur og kaldur gjøstur niður eftir bakinum, tá hesin nýggi inkvisitorurin við sálvumiklari rødd í útvarpinum stutt eftir ólavsøku bar fram harmljóð sítt um, at Føroya løgmaður hevði dittað sær (uttan at havt spurt hann, Jenis, eftir!) inn í Grasagarð til tess at vísa hesum fólkum, at **hann** – í hvussu so er – ikki hevur burtursagt tey, men viðurkennir tey sum Guðs skapningar ið eiga sín sjálvsagda rætt at liva í hesum okkara samfelagi sum vanligir borgarar uttan at benda eftir teimum og meta tey sum »útskot«.

Ymist er sum hvør einstakur okkara er útborin – handliga og andliga. Summi eru handliga ella kropsliga illa fyri, tá tey koma í verðina; onnur eru andliga illa útborin. Tilvildarlig forsturtøka er av tí ónda og eigur at vera avmarkað til tað minst møguliga – tað kunnu vit vera samd um. Sum lækni veit Jenis av Rana, at børn koma í verðina við ymsum brekum og lýtum – andligum ella likamligum. Hann veit eisini, at framkomna tøknin kann nærum við vissu ávísa og staðfesta ávís brek longu nakrar mánaðir eftir gitnaðin; kanska eisini tað, at barnið longu í móðurlívi hevur tað eyðkenni, sum fer at gera tað samkynt, tá tað verður kynsliga búgvið. Tá kundi hann, andsýnis tí Várharra mælti til, lúka »illgresið« burtur í góðari tíð, hóast okkurt av hveitini av misgáum kanska kom at fylgja við og hevði møguliga broytt hugsan hansara, ella komið honum – Jenisi – í eina tvístøðu um fosturtøku.

Løgið tykist tað mær – og kanska mongum øðrum okkara – at eingin letur við seg koma, at ein tinglimur – parlamentarikari – kann hóreiggja sær, sum Jenis av Rana ger, og skorða seg undir trúarmál. Er tað kanska stillisliga vorðið góðtikið, at hann hevur tikið við luti Várharra? Ella eru »taburettirnar« vornar so dýrabarar, at einki – etiskt ella óetiskt – kann viga upp í móti?

# Landet, folket, fisken

**Nina Dahl**

Laksen er et eventyr, der er ved at gå ind i en Tornerosesøvn. Aladin og den vidunderlige olielampe lader vente på sig – og mens vi taler om fremtiden og det videnbaserede samfund, der skal skabe eksportkroner og arbejdspladser, er det nutiden og den realitet, at Færøerne i mange år fremover vil være bundet til fisken.

Redere, fiskere og fabriksdirektører giver gensidig hinanden skylden for, at fisken går utilvirket ud af landet. Politikerne taler om at skabe nye arbejdspladser og forudsætning for trivsel, imens de eksisterende arbejdspladser ekspoteres ud af landet til Europa til videreforarbejdning (ikke til kineserløn), og økonomerne bekræfter hinanden i, at markedskræfterne må man ikke røre ved.

Ingen tør tale om at lægge en told på den fisk, der går utilvirket ud af landet, Det hele er nok ikke så slemt. Lagmanden siger, at trods alt er arbejdsløshedsprocenten ikke mere end 4%. Statestik er så mange ting. Giver det mening at tale om 4% arbejdsløshed?

Politisk ønsker man ligestilling mellem mænd og kvinder. Arbejdsløsheden rammer især kvinder. Hvor høj er arbejdsløsheden mellem kvinder? Politisk ønsker man at støtte lokalsamfundene. Arbejdsløsheden rammer i allerhøjeste grad lokalsamfundene. Hvad er arbejdsløsheden målt i % udenfor Strømø, og endelig, hvor høj er arbejdsløsheden blandt ufaglærte i forhold til faglærte og funktionærer.

Læg en told på den fisk, der går utilvirket ud af landet – sæt den i en erhvervsfond fiskeindustrien til fremme med en særlig bonusordning til nye produkter.

Forskellen på indkøbsprisen af fisken og det, den er værd, når den er på markedet, er de lønkroner, som arbejderen får, og den fortjeneste, der er opnået, den ligger tilbage i landet til forbrug her og ikke i Europa.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Kommunusamanlegging í Suðuroynni

**Jacob Vestergaard**



Tá Sumbiar Kommuna tók stig til at kanna møguleikan fyri at leggja kommunurnar í Suðuroynni saman í eina kommunu, var tað við tí fyri eyga, at royna at samansjóða Suðuroynna, og fyri at fáa suðuroyingar at hugsa sum suðuroyingar.

Hugburðurin er broyttur nakað seinastu árini, so tað í dag er lættari at tosa um kommunusamanlegging, enn tað var fyri bert fáum árum síðan, men tíverri vísur tað seg at nakað skal til afturat, áðrenn øll Suðuroyggin kann savnast í eina kommunu.

Hóast kanningar hava víst, at meirilutin av suðuroyingum taka undir við kommunusamanlegging, har øll Suðuroyggin verður løgd í eina kommunu, hava kommunupolitikarar í Suðuroynni eina aðra áskoðan. Soleiðis var tað bert Tvøroyrar Kommuna sum var sinnað at koma á fund við okkum, at tosa um kommunusamanlegging.

Kommunusamanlegging kann og skal bert fara fram, um einstaka kommunan er sinnað fyri tí, og tí er tað fult og heilt upp til kommununa at gera av, um hon vil leggja saman við aðrari kommunu ella ikki.

So tá sagt verður, at »um« kommunusamanlegging skal verða, er tað at skáka sær undan at taka støðu til spurningin. Somu kommunur átti at sagt okkum, hvat skal til, fyri at tíðin skal verða »búgvin« til kommunusamanlegging.

Tíðin er nakað knøpp, tí kommunuval verður í heyst, men flest allir kommunupolitikarar eiga at hava gjørt sær tankar/hugsanir um spurningin, og átti tað tí ikki at verið nakar trupulleiki við tíðini, um viljin annars var til staðar.

Ein hoyrir framvegis sjónarmiðið um at leggja Suðuroynna saman í tvær kommunur, men hóast undirritaði tók undir við hesum, sum eina byrjan, tá kjakið um kommunusamanlegging tók seg upp miðskeiðis í 90-árunum, er tað mín sannføring í dag, at tíðin er farin frá hesum.

Hyggja vit at teimum kommunusamanleggingum sum eru framdar, har vit hava fingið rættuliga stórar kommunalar eindir, gevur tað als onga meining, at býta Suðuroynna, við uml. 5000 fólkum, sundur í tvær kommunur.

Suðuroyggin er eitt náttúrligt økið at leggja saman í eina kommunu. Vit eru øll í sama báti, og tí í somu støðu, og mugu og skulu draga eina línu. Við einari kommunu í Suðuroynni høvdu vit havt amboðið til at samansjóða alla Suðuroynna sum eina eind. Hetta hevði ikki verið møguligt, um vit býttu oynna upp í tvær kommunur.

Vit høvdu vónað, at tað vóru fleiri kommunur, sum tóku av okkara innbjóðing. Átakið var meint sum ein roynd at samansjóða kommunurnar í Suðuroynni, so vit á tí kommunala økinum komu at standa saman sum ein.

Vit høvdu betur kunna lagt til rættis, hvørji átøk skuldu verið gjørd á øllum økjum, soleiðis at tey gagnaðu Suðuroynni best. Samlaði kommunukassin á uml. 100 milliónir kundi verið brúktur nógv betur, so hann tænti heildini, allari Suðuroynni.

Vit høvdu kunna økt tænastuna til borgaran í Suðuroynni munandi á øllum økjum, og kundu veruliga bjóða okkum fram, javnbjóðis við aðrar partar av Føroyum. Vit kundu somuleiðis fingið gagnnýtt tær tænastur, sum vit hava í Suðuroynni, bæði á privata og kommunala økinum, munandi betur. Hetta hevði økt okkara førleika og verið við til at skapt arbeiðspláss í Suðuroynni.

Kommunurnar í Suðuroynni hava, sum er, onga umhvørvisdeild, onga sosiala deild, bert avmarkaða orku á tekniska økinum, o.s.fr.

Hetta eru alt tænastur, sum vit keypa aðrastaðir, fyri nógvar privatar og kommunalar pengar. Harvið eru vit við til at uppihalda ikki so fá kvalifiseraði størv aðrastaðir, størv sum vit kundu havt í Suðuroynni.

Taka vit t.d. umhvørvisøkið, so hava kommunurnar í Suðuroynni ongan umsitingarligan førleika á økinum, hvørki til at røkja tær vanligu kommunalu uppgávurnar á umhvørvisøkinum, ella aðrar uppgávur av meira tekniskum slag.

Vinnulívið og kommunurnar í Suðuroynni brúka eina rúgvu av pengum til kanningar av ymiskum slag, kanningar sum væl kundu verið gjørdar á einari vælkvalifiseraðari umhvørvisstovu/-deild í Suðuroynni.

Sama er galdandi á øðrum økjum, ikki minst á sosiala økinum, har rættuliga nógvir pengar verða brúktir til tænastur/ráðgevarar, av ymiskum slag.

Vit hava ongantíð hugsað um Suðuroynna sum eina eind, og lagt politikkin á teimum ymisku økjunum til rættis eftir tí.

Vit hava hvør í sínum lagið bert hugt eftir okkara lítla øki, okkara kommunu, og ikki hugsað um heildina. Tað vísur seg at verða sera trupult at koma burturúr »dunnuhylinum«. Viðmerkingarnar seinastu dagarnar eru gott dømi um tað.

Í einari samráðingarstøðu, har kommunurnar settu sær fyri at leggja Suðuroynna í eina kommunu, høvdu vit havt ein gyltan møguleika at hugt eftir allari Suðuroynni, frá Sumba til Sandvík.

Vit kundu lagt til rættis, hvar í Suðuroynni vit skuldu skipa okkum á teimum ymisku økjunum, tað verið seg á vinnuøkinum, sosiala økinum, mentanar økinum, skúla økinum, o.s.fr.

Við at hyggja at Suðuroynni sum einari eind, hevði eisini verið neyðugt at tikið atlit til, hvat er neyðugt fyri trivnaðin í teimum ymisku bygdunum, og stuðla undir tí, men samstundis duga at skipa so fyri, at savna allar suðuroyingar til ávís tiltøk, og á tann hátt hækkað støðið á ymiskum økjum.

Við einari kommunu í Suðuroynni hevði hugburðurin hjá suðuroyingum broytst. Vit kundu tá betur staðið saman, og lært suðuroyingar at brúkt tær tænastur, sum hóast alt eru í Suðuroynni, í staðin fyri at farið aðrastaðir.

Við tí rætta hugburðinum, hava vit alt at vinna við at leggja Suðuroynna saman í eina kommunu. Við tí rætta hugburðinum verða tað ongin taparar, bert vinnarar. Tá verður tað ongantíð spurningurin hvør kemur at »bestemma« yvir hvørjum, men heldur tað, at vit í felag fáa sum fragast burturúr, allari Suðuroynni at gagni.

Longur vit bíða við at leggja kommunurnar saman, verri verður tað at fylgja við restini av landinum. Avgerðin hjá tí einstøku kommununi kann ikki verða avgerðandi fyri, um aðrar kommunur leggja saman ella ikki.

Í skrivandi stund verður hugsað um at fara undir samráðingar um at leggja Sumbiar og Tvøroyrar kommunu saman. Hvussu verður við tí, er ov tíðliga at siga nakað um tað enn. Um Sumbiar og Tvøroyrar kommuna leggja saman í »Suðuroyar Kommunu«, er tað eitt stig á leiðini til at leggja alla Suðuroynna saman í eina kommunu.

Tað hevði verið ein góð byrjan, og dugi eg ikki við míni bestu sannføring at síggja nakran vansa í at leggja Sumbiar og Tvøroyrar kommunu saman. Ein kundi tá sæð fram til, at tað til kommunuvalið í 2008 bleiv valt til eina kommunu í Suðuroynni.

# Føroyar vilja taka størri globala ábyrgd

**– Men hjálpin má ikki drukna í burokrati og fyrisiting sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**

MENNINGARHJÁLP

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður: – Føroysk menningarhjálp má ikki drukna í burokrati og umsiting*

– Komandi føroyska menningarhjálpin eigur ikki at drukna í burokrati og umsiting. Ætlanin er at brúka longu kendar felagsskapir og teirra royndir og ekspertisu í eitt nú Danmark ella Íslandi. Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður við mánaðarblaðið hjá danska hjálparfelagsskapinum DANIDA. Blaðið skrivar, at føroyingar ætla sær at taka størri globala ábyrgd og vera meira virknir, tá talan er um at vera við til at loysa trupulleikar í menningarlondunum.

Í blaðnum »Udvikling«, sum júst er útkomið sigur løgmaður, at til tess at forða fyri at avmarka móttakaralondini, so skal man broyta fokus burtur frá fiskivinnuni. – Føroyingar eru góðir til annað enn fiskarí, eitt nú IT. Vilja vilja økja um útbjóðingarmøguleikarnar og á henda hátt skapa ein samanhang millum føroyska vinnulívið og globalar samstarvspartnarar sigur løgmaður við blaðið.

Blaðið skrivar annars, at sum heild eru politikarar í Føroyum positivir, tá talan er um økta meninngarhjálp, men tilmæli hjá ST um at lata 0,7 % av bruttotjóðarúrtøkuni er tó eitt sindur ov ambitiøst fyri Føroyar. Tað vil svara til 70 milliónir kr.

Jóannes Eidesgaard sigur, at Føroyar koma at lata sjey milliónir í menningarhjálp afturímóti teimum 200.000 til 300.000 kr., sum higartil eru latnar um árið og sum hava verið umsitnar av eitt nú ymiskum átrúnaðarligum felagsskapum. Landsstýrið hevur tó latið tvær milliónir kr. til Afganistand og tvær til Kosovo.

